TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Pauli Einarsson og Bjarni Hammer

Ikki Møtt (fráboðað): Bogi Johannesen
Skrivari: Fróði Mortensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skatti jan.-okt. 2019-2020 | 2 |
| 2 | Fíggjarætlan 2021 -2. Viðgerð | 2 |
| 3 | BHS -Fíggjarætlan 2021 fyri Bú- og Heimatænastuna | 4 |
| 4 | HR-Skipan | 5 |
| 5 | Fjølrit -Sáttmálið um nýtslu av vardum verkum | 5 |
| 6 | Uppskot um samstarv við Nám um undirvísingartilfar | 6 |
| 7 | Arbeiðsbilur til Teknisku deild | 8 |
| 8 | Skaði a havnarlagið á Drelnes | 9 |
| 9 | Sáttmáli um vetrahald 2020/2021 -Landsverk | 10 |
| 10 | Endurskoðan av byggisamtyktini 2020 - leingjan | 11 |
| 11 | Eykajáttanir fyri ár 2020 -1. viðgerð | 11 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

00.34.00-1-20

## 1. Samanbering av skatti jan.-okt. 2019-2020

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 2. november 2020.**
Samanbering av skattainntøkum 2019/2020-09 (Jan-Okt.)

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 1:**
Málið var umrøtt og kunnað.

### Avgerð

Málið kunna og umrøtt

**00.30.00-2-20**

## 2. Fíggjarætlan 2021 -2. Viðgerð

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 21.09.2020**
Samb. teldpost frá TAKS 18.09.2020, er skattainntøkur fyri 2021 mettar at vera:

Inntøkurgrundalag (fyri persónsskatt) kr. 304.588.832.-

- Persónsskattur (20,9%) kr. 63.659.066,-
- Pensionistafrádr. (335) kr. -1.005.000,-
- Barnatal 386, fráfr. kr. -2.702.000,-
- P/F Skattur kr. 2.000.000,-
- **Mettur skattur kr. 61.952.066,-**

**Fíggjarnevndin, 23. september 2020, pkt. 2:**
Einmælt samtykt at varðveita sama skattaprosentið á 20.90% og barnafrádrátturin á kr. 7.000,-, sum eisini var galdandi fyri ár 2019. -Fíggjarnevnevndin mælir til, at 2. viðgerð av fíggjarætlin verður avgreidd til býráðsfundin 28. Otober, har arbeiðsdagur verður lýstur í góðari tíð. -Málið verður beint í býráðið.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kommunustjórin 23.11.2020**
2 uppskot eru til fíggjarætlan FÆ2021
- Uppskot A: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir
- Uppskot B: Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen og Bjarni Hammer

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 2:**
2 tilmælir eru til fíggjarætlan FÆ2021
- Uppskot A: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir
- Uppskot B: Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen og Bjarni Hammer

Málið verður beint í býráðið

**Avgerð**

Broytingar uppskot:
- Bjarni Hammer skjýtur upp, at grein §5 24.14.-20 "Stuðul til Ítrótt" verður økt við 200tkr. ájavnt við kr. 800.000,-

**Stemma verður fyrst um minniluta uppskotið A:** framsett av "Kristin Michelsen, Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir" -Skattaprosent 20,9, barnafrádrátt 7.000,-, Íløgur kr. 25,9 mió,
Fyri eru 3 atkvøður: "Kristin Michelsen, Alvi Mortensen og Anita Vibergsdóttir"
Ímóti eru 4 atkvøður: "Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Pauli Einarsson og Bjarni Hammer"
Uppskoti A er harvið fallið

**Stemma verður um uppskoti B frá meirilutanum saman við broytingar uppskotinum:**
"Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen og Bjarni Hammer" - Skattaprosent 20,9, barnafrádrátt 7.000,-, Íløgur kr. 20,8 mió,
Einmælt samtykt.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

00.30.00-2-20

## 3. BHS -Fíggjarætlan 2021 fyri Bú- og Heimatænastuna

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 2. oktober 2020**
Fíggjarætlan 2021 fyri Bú-og Heimatænastuna til viðgerðar

**Sosiala nevnd, 12. oktober 2020, pkt. 1:**
Amy Bech, fíggjarleiðari luttók í málsviðgerðini. Fíggjarætlanin fyri BHS var kunna og viðgjørd, við tí viðmerking, at inntøkumetingin í fíggjarætlanini ikki er røtt samb. kunning frá Amy Bech. Nýggj inntøkumeting (afturberingin) galdandi fyri Tvøroyrar kommunu, er kr. 21.513.000,- og ikki kr. 22.339.000,- Einmælt samtykt, at heita á stýrið fyri BHS at viðgera fíggjarætlanina av nýggjum, og at fíggjarleiðari hjá Tvøroyrar kommuna framyvir skal luttaka á stýris fundinum hjá BHS, tá fíggarviðurskiftir eru á skrá, sum samtykt av Tvøroyrar býráð.

**Kommunustjórin 16.10.2020**
Kommunustjórin hevur sent skriv til leiðsluna og stýrisform. fyri BHS, um at viðgerða fíggjarætlanina fyri BHS av nýggjum, nú afturberingin til kommunurnar er munandi minni enn ásett í fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 3:**
Nevndin er kunnað um at fundur verður í Bú- og Heimatænastuni, og at nýggj fíggjarætlan verður gjørd.
Málið verður tikið uppaftur.

**Kommunustjórin 23. november 2020**
Mælt verður til at Tvøroyra kommuna góðkennur fíggjarætlanina 2021 fyri BHS, við regulering í inntøkumetingini, -samsvarandi afturberingina hjá Tvøroyrar kommunu.

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 6:**
Einmælt samtykt at afturberingin hjá Tvøroyrar kommuna fer í samstarvið, treyta av at allar kommunurnar taka undir við hesari ætlanini, og gera hetta sama við teirra afturbering.

### Avgerð



Formansváttan

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini 25. november 2020, at afturberingin hjá Tvøroyrar kommuna fer í samstarvið, treyta av at allar kommunurnar taka undir við hesari ætlanini, og gera hetta sama við teirra afturbering.

**85.11.06-A21-1-19**

## 4. HR-Skipan

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 5. nov. 2020**
Mælt verður til at taka av tilboði frá Formula uppá HR-Skipan, ið er eitt telduforrit til at skráseta øll starvsfólkaviðurskiftir á tryggan hátt. Skipanin er ment av Formula, og lúkar øll krøv til dataverndarlógv, sum kemur í gildi 1. januar 2021. -Mælt verður til at hetta verður fíggja av grein §115.

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 3:**
Einmælt samtykt.

### Avgerð

Einmælt samtykt

**00.01.00-6-18**

## 5. Fjølrit -Sáttmálið um nýtslu av vardum verkum

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 16.11.2020**
Tvøroyrar kommunu hevur gjørt avtalau við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum til undirvísingarvirksemi og innanhýsis nýtslu. Avtalan var galdandi til 31. juli 2020, og er nú sostatt ongin avtala.

Fjølrit hevur umvegisteldupost heitt á Tvøroyrar kommunu, um at leingja avtlauna enn sum eitt royndarstíðarskeið, við gildi frá 1. august 2020 til 1. august 2022

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kostnaður**
Eftir avtaluni er kostnaðurin grundaður á 200 kr. fyri hvønn fólkaskúlanæming. Samb Jón Johannesen, skúlastjóra eru d.d. eru 233 næmingar í Tvøroyrar skúla. -Tvs. kostnaðurin verður kr. 46.600,- umframt umsitinngargjald. á kr. 13.080,-, pr. ár.

Skúlastjórin hevur fingið avtaluna til hoyring í dag, og hevur enn ikki svara. Kommunustjórin mælir til at leingja avtalauna, samb. uppskot til til avtalu.

**Mentanarnevndin, 16. november 2020, pkt. 7:**
Einmælt samtykt at leingja sáttmálan við Fjøllrit samb. sáttmála.

**Kommunustjórin 27.11.2020**
Skúlastjórn hevur hin 20.11.2020 fráboðað umsitingini, at hann mælir til, at kommunan leingir sáttmálan við Fjølrit um loyvið at gera brúk av vardum verkum til undirvísingina í Tvøroyrar Skúla.

**Avgerð**

Einmælt samtykt

**17.02.09-A00-1-18**

## 6. Uppskot um samstarv við Nám um undirvísingartilfar

**Málsfrágreiðing**

**Býráðið, 3. december 2018, pkt. 18:**
Málið verður beint í mentanarnevndina.

**Kommunustjórin 28.09.2020**
Kommunufelagið hevur, vegna kommunurnar, tingast við Nám um eina standardavtalu, sum í innihaldi kann vera grundarlag undir einum felags grundstøði fyri samstarvi millum Nám og kommunurnar um tær tænastur, sum Nám veitir kommununum viðvíkjandi undirvísingartilfari í fólkaskúlanum. Tað er tó einstaka kommunan sum ger av, um hon ynskir eina slíka avtalu við Nám, og tað eru einstaka kommunan sum er sáttmálapartur mótvegis Námi.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Fyri kommunurnar kann tað vera heldur ógreitt, hvussu prísstøðið hjá Námi passar við, hvat ymsu kommunurnar í veruleikanum brúka uppá undirvísingartilfar í fólkaskúlunum. Helst er tað soleiðis, at tað er ymiskt hvat kommunurnar í dag rinda til Nám, men hetta snýr seg møguliga meira um, hvussu kommunurnar raðfesta undirvísingartilfar, enn hvat er ein rættur ella hóskandi prísur fyri tænasturnar. Nám hevur tí útgreinað prísin og komin við frágreiðing um, hvussu Nám kemur fram til prísásetingina fyri ymsu tænasturnar, og sæst hetta í fylgiskjali til avtaluna.
-Avtala er at skúlastjórin møtur á fundinum-

**Mentanarnevndin, 12. oktober 2020, pkt. 4:**
Jón Johannesen, skúlastjóri var á fundi fyri at greiða frá um samstarvsavtaluna við Nám. Jón upplýsti at d.d. eru 233 næmingar í Tvøroyrar skúla. Jón Johannesen vendur aftur til umsitingina hjá Tvøroyrar kommunui, við meira kunning eftir fundin millum skúlaleiðsluna og Nám 29. oktober. 2020

Uppskotið frá Námi er, at kommurnur gjalda:
Skúlaárið 2021/2022 – 1020 kr./næming
Skúlaárið 2022/2023 – 1100 kr./næming
Skúlaárið 2023/2024 – 1150 kr./næming

Kostnaðurin fyri Tvøroyrar skúla veður við næmingatalið á 233, verður sostatt kr. 237.660,- fyri skúlaárið 2021/2022.

**Einmælt samtykt, at málið verður viðgjørt til fíggjarætlanina fyri Tvøroyrar kommunu FÆ2021.**

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 2:**
Nevndin er kunnað um at, at málið verður viðgjørt til fíggjarætlanina fyri Tvøroyrar kommunu FÆ2021.

**Kommunustjórin 27.11.2020**
Skúlastjórin og kommunustjórin mæla til at samtykkja sáttmálan við Nám.

**Avgerð**

Einmælt samtykt



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

83.11.00-I00-1-11

## 7. Arbeiðsbilur til Teknisku deild

### Málsfrágreiðing

Tekniskur leiðari 10-09-2020:
Fleiri fólk eru komin til deildina og hevur verið vanligt at teir tímaløntu hava brúkt privatbilarnar, men er hetta ikki møguligt longur. Formaðurin í deildini hevur tí vent seg til tekniska leiðaran um at fáa fleiri bilar til røttu endamálini. Eisini er so at nakrir av bilinum eru sera gamlir og kunnu ikki gerast aftur.

a) Tí verður mælt til at keypa bilar til deildina sum nøkta rætta tørvin. At byrjað við er brúk fyri einum 4x4 lastbili, líknandi sum tann grái sum JMB brúkar, tó uttan vippulast.
b) Seinri er brúk fyri at skifta bláa lastbilin út, tí hesin er í so ringum standi, líknandi bilur skal keypast og samstarvi við kaifútar heldur fram sum nú.

**. 19. oktober 2020, pkt. 2:**
At 4x4 bilur verður keyptur nú og leasaður. Samlaður prísur 450.000,-
Til endamálið verður skotið upp, at flyta upphæddina frá "rakstrarjáttanini til kloakk 622" til "løgujáttanina fyri maskinur og bilur".

**Tekniska nevnd, 19. oktober 2020, pkt. 2:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku deild, og umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Kommunustjórin 23.11.2020**
Mælt verður til at keypa ein arbeiðsbil til Tekniska deild, og at hesin verður fíggjaður av fytingum millum játtan til Teknisk mál grein §629 "Maskinur og bilar" og §623 "Bygging og løguframleiðsla"

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 8:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá kommunustjóranum, og heitta á tekniskaleiðaran at bíleggja bilin beinanvegin.

### Avgerð

Einmælt samtykt



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**08.08.15-Ø61-1-20**

## 8. Skaði a havnarlagið á Drelnes

### Málsfrágreiðing

**Arbeiðið skal gjaldast av tryggingarfelagnum Skuld, og tey hava eina trygd uppá 2,9 mill. kr., men kommunan má gera arbeiðini fyrst og leggja út, og hareftir senda kravið til Skuld. 17. november 2020, pkt. 2:**

**Vinnu- og havnanevnd, 17. november 2020, pkt. 2:**
Nevndin er kunnað, og málið verður beint í fíggjanevndina.

**Kommunustjórin 23.11.2020**
Mælt verður til at kommunan garanterar fyri kostnaðinum av arbeiðinum yvir fyri arbeiðstakarinum, samb. tilboð, og eftirfylgjandi framsetur kommunan tilsvarandi krav ímóti tryggjingarfelagnum Skuld, tá arbeiði er liðugt.

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 5:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið kommunustjóranum. -málið verður beint í býráðið

### Avgerð

Einmælt samtykt

Tvøroyrar Kommuna

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**08.25.15-1-19**

## 9. Sáttmáli um vetrahald 2020/2021 -Landsverk

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 15.09.2020**
Landsverk hevur sent umsitingini uppskot til nýggjan vetrasáttmála galdandi fyri 2020/2021. Til viðgerðar og støðutakan hjá Tekniskunevnd er hvør tørvururin er á hesum.

**Tekniska nevnd, 19. oktober 2020, pkt. 3:**
Nevndin er kunnað um, at kommunan longu hevur ein sáttmáli við Landsverk fyri 20/21 undirskrivað í desember 2019.
Umsitingin setir seg í samband við Landsverk hesum viðv.
Teknisku deild arbeiðir eisini við at útvega útgerð til kavarudding, sum áður er samtykt.

**Tekniska nevnd, 23. november 2020, pkt. 4:**
Tekniski leiðarin, Linn Augustinussen, kunnaði um fund við Landsverk, har tað kom fram, at Landsverk ikki heldur, at sáttmálin frá desember 2019 er galdandi fyri 20/21.
Ein nýggjur sáttmáli er skrivaður, við somu orðing - tó er strekkið, sum Landsverk hevur beinleiðis ábygrd av, minkað eitt sindur.
Kommunan kann tó framvegis tilkalla Landsverk eftir tørvi.

Nevndin tekur undir við at undirskriva sáttmálan.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 23.11.2020**
Mælt verður til at taka undir við sáttmálanum um vetrarhald við Landsverk

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 9:**
Einmælt samtykt

### Avgerð

Einmælt samtykt

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**01.02.00-P15-1-20**

## 10. Endurskoðan av byggisamtyktini 2020 - leingjan

### Málsfrágreiðing

Byggisamtyktin hjá Tvøroyrar Kommunu gongur út í 2020.
Mælt verður til, at søkja um leingjan til 1. januar 2022.

**Tekniska nevnd, 23. november 2020, pkt. 1:**
Nevndin mælir til at søkja um leingjan til 1. januar 2022.
Málið verður beint í býráðið.

### Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Teknisku nevnd

**00.30.14-1-20**

## 11. Eykajáttanir fyri ár 2020 -1. viðgerð

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 23.11.2020**
Fíggjardeildin er ikki liðug við uppgerðini av eykajáttan og flytan millum konto fyri 2020.

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 10:**
Málið verður beint í býráðið

**Kommunustjórin 27.11.2020**
Fíggarætlanin fyri 2020 framroknað vísir avlop á kr. 16.108.577,- fyri rakstur og íløgur.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Meirnýtsla er tó á nøkrum greinum innan:

- §1 Kommunalafyrisitingin kr. -28.039,-
- §2 Almanna og heilsumál kr. -78.058,-
- §3 Børn og ung kr. -274.882,-
- §5 Mentan og frítið kr. -148.555,-
- §6 Teknisk mál kr. -1.240.845,-
- §7 Umhvørvi kr. -678.089,-

**Samla: kr. -2.448.470,-**

Mælt verður til at fíggja meirnýtsluna við flytingum innan hvørja grein sær.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fíggja meirnýtsluna við flytingum millum konto innan hvørja grein sær.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 30. november 2020 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin 30.11.2020, kl. 20:05**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Pauli Einarsson

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen